## Eingin fundur enn



Danska-grønlendska sjálvsstýrisnevndin fer ikki at halda fund aftur fyrr enn seinast í januar ella kanska ikki fyrr enn fyrst í februar. Tað bleiv avgjørt á fundi millum teir báðar tingformenninar, Jonathan Motzfeldt og Thor Pedersen, í Keypmannahavn týsdagin. Teir báðir eru ávikavist formaður og næstformaður í sjálvsstýrisnevndini. Enn er ikki avgjørt, hvør skal umboða Fólkatingið í nevndini, tí einstakir limir eru ikki í tinginum longur.

## Páll einsamallur á Sandoynni

Sandoyar Tjóðveldisfelag hevði 2. og 3. uppstillingarfund til løgtingsvalið í Virkinum á Sandi í gjárkvøldið. Nógv fólk vóru møtt at umrøða nýggju avbjóðingina til uppstilling, nú Føroyar verða eitt valdømi á komandi løgtingsvali. Lívligt kjak var, og fundurin gjørdi av at stilla eitt valevni upp fyri Sandoyar Tjóðveldisfelag. Kapping varð um uppstillingina, men fundurin gjørdi av at stilla upp løgtingsmannin í oynni, Páll á Reynatúgvu. Sostatt verður hann einasta valevni hjá Sandoyar Tjóðveldisfelag á listanum hjá Tjóðveldi til komandi løgtingsval.

# Haldið semjuna ella slíti eg

**So bersøgin er formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, nú samgongulimir hvør í sínum lag leggja uppskot í hundrað milliónaflokkinum fram av sínum eintingum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Kaj Leo Johannesen setur samgonguni knívin á barkan: Haldið fíggjarlógarsemjuna ella slíti eg samgonguna*

Kaj Leo Johannesen lovaði ilt av sær á tingsins røðarapalli í gjár. Hann segði bart út, at hildu samgongulimir seg ikki til fíggjarlógarsemjuna, sum gjørd varð í farnu viku, so var eingin samgonga meir.

FormaðurSambandsflokssins sigur, at tað á ongan hátt kann góðtakast, allir liggja í sjálvdrátti minni enn viku eftir, at semja varð gjørd um, at soleiðis skuldi ikki farast fram.

- Nú kemur ávísur javnaðarmaður við einum uppskoti til ein skúla til 180 milliónir av sínum eintingum. Og tað er serstakliga ósmæðið, tí tað er júst Javnaðarflokkurin, sum alla tíðina hevur forðað fyri nettup skúlamálinum. Bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava alla tíðina verið fyri hesum málinum, men Javnaðarflokkurin blokeraði. Um hesin javnaðarmaðurin meinar nakað við nýggja skúla, kundi hann bara havt tikið undir við okkum, tá málið var frammi, sigur Kaj Leo Johannesen.

FormaðurSambandsflokssins skýrir tað fyri óseriøsitet, sum er galdandi fyri alt tingið, og tað er henda óseriøsitet, hann vil hava at halda uppat.

- Óskilið, sum vit síggja nú, er fremsta orsøkin til, at landið fór á heysin fyrst í 90-árunum. Síðani vit gjørdu fíggjarlógarsemjuna hava vit fingið tvey uppskot sum einsamøll kosta upp móti hálvari milliard. Og tað er greitt, at sum ábyrgdarhavari av búskapi landsins kann Sambandsflokkurin ikki standa modell til slíkt, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Krevur fund

Kaj Leo Johannesen er so fortørnaður inn á tað, sum hann metir sum fíggjarligt ábyrgdarloysi, at hann er til reiðar at slíta samgonguna, taka samgongulimir ikki annað skinn um bak.

- Eg havi kravt ein fund við formenninar í hinum báðum samgonguflokkunum, og har ætli eg mær at krevja, at teir halda seg til ta semju, sum varð gjørd í síðstu viku. Og kann eg ikki fáa lyfti um tað, fari eg at mæla løgmanni til at skriva út nýval, tí er eingin fíggjarlógarsemja, er heldur eingin samgonga, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vil sum so ikki peika á nakran ávísan samgongulim, men tað er einki at ivast í, at hann fyrst og fremst hugsar um Anfinn Kallsberg, sum hevur lagt uppskot fram um tunnil Norð um Fjall, og John Johannesen, sum hevur lagt uppskot fram um nýggjan studentaskúla.

Løgmaður er sum kunnugt uttanlands í løtuni, men skuldi koma til landið eftir evstamark blaðsins, og Kaj Leo Johannesen sigur, at hann fer at krevja fundin so skjótt løgmaður er komin til landið, og áðrenn, at triðja viðgerð av uppskotinum um at stytta tíðina frá tí valið er útskrivað til valið verður hildið, kemur fyri.

- Fáast flokkarnir ikki at halda seg til semjuna, gevur tað onga meining at halda fram í samstarvinum. Tá verður bara talan um at slíta hvønn annan upp seinastu vikurnar, og tað er óheppið, tí vit hava havt eitt sera gott samstarv í samgonguni alla tíðina, sigur Kaj Leo Johannesen.

Men hann var avgjørdur, tá vit tosaðu við hann fyrrapartin, og tí er ikki púra vist, at nøkur samgonga framvegis er til, tá dagurin í dag fer at aftna.

# Irak-kríggið ikki danskt innaríkismál

**Tað sigur Høgni Hoydal sum annars vísir á, at tað júst eru danir, ið hava drigið Føroyar inn í hetta málið**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal metir als ikki, at hann blandar seg í danskan innanríkispolitikk, so sum Jørgen Niclasen ákærir hann fyri*

Fólkatingslimurin fyri Tjóðveldi, Høgni Hoydal, vil ikki hava sitandi á sær, at hann blandar seg inn í donsk innanríkismál soleiðis, sum Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, annars førdi fram í blaðnum í gjár.

Tjóðveldi hevur alla tíðina gjørt greitt, at vit sjálvandi gera okkara støðu greiða og taka virknan lut í teimum málum, har Danmark tekur avgerðir fyri føroyingar. Og tað er júst støðan í hesum máli, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at tað er Danmark, ið hevur drigið Føroyar og føroyingar inn í Irak-kríggið - hóast Løgtingið mótmælti.

Tað vísir bert enn einaferð, at okkara núverandi støða hevur einki við fólkaræði at gera, sigur Høgni Hoydal

FólkatingslimurTjóðveldis vísir eisini á, at hann á ongan hátt hevur sitið kúrrur, tá málið hevur verið fyri á Christiansborg.

Eg havi bæði tíðliga og seint mótmælt hesi avgerð á Fólkatingi og havi fyrr tikið lut í uppskotum, sum skulu greina hesa vanlukkuligu avgerð. Og tað geri eg sjálvandi eisini hesaferð, sigur Høgni Hoydal.

Hann undrast annars á, hvat ein kanning av grundarlagnum og avgerðunum um Irak-kríggið, sum Føroyar beint ímóti fólkaræðisligum mannagongdum, er partur av, skal gera av skaða ella hvat tað hevur við danskan innanríkispolitikk at gera. Tað heldur hann er nakað, Jørgin Niclassen má greiða frá.

Eg haldi tað er lítið sømiligt, at formaður Fólkfloksins leggur eftir Tjóðveldinum við skeivum upplýsingum og gongur beint ímóti eini løgtingssamtykt, sum er fráboðað donsku stjórnini, sigur Høgni Hoydal, fólkatingslimur hjá Tjóðveldi.